Landssjúkrahúsið

**Innbjóðing til fyribyrgjandi kanning móti krabbameini í lívmóðurhálsinum – 1/2 til 1 ára millumbilakanning.**
**Kanningin er ókeypis hjá egnum lækna.**

Tað eru oftast kvinnur í bestu árum, sum fáa krabbamein í lívmóðurhálsinum, tað kemur meira enn so fyri hjá ungum kvinnum eisini. Kyknubroytingar kunnu vera til staðar leingi, áðrenn tær broytast til veruligt krabbamein. Tað ber til við einari einfaldari kanning hjá kommunulæknanum at taka eitt sindur av slími við lívmóðurmunnan til kanningar fyri kyknubroytingar. Leingi áðrenn nakað sæst við berum eygum, kunnu vera broytingar í kyknunum, sum bert síggjast við sjóneyku.

- **Ring til kommunulæknan og bið um eina tíð til fyribyrgjandi kanning móti krabbameini í lívmóðurhálsinum.**
- **Hav hetta brævið við tær til kommunulæknan. Læknin ger síðani eina undirlívskanning og skavar eitt sindur av slími av lívmóðurhálsinum og sendir tað til nærri kanningar.**
- **Úrslitið av kanningini verður sent til kommunulæknan.**
  **Kommunulæknin og tú avtala, hvussu tú fært úrslitið av kanningini.**

Hevur tú sjúkutekin frá undirlívinum, skal tú venda tær til læknan beinanvegin.

Vinaliga

Patologisk deild
Rannsóknarstovan
Landssjúkrahúsið

**Landssjúkrahúsið**
**Patologisk deild**
J.C. Svabosgøta 41-49, 100 Tórshavn, tel. 30 45 00, lokal 5604 fax 30 46 02 www.ls.fo